# KT-vørður
til Sjónvarp Føroya

Eitt starv sum KT-vørður er leyst at søkja í Sjónvarpi Føroya.

Arbeiðið umfatar umsiting av servarunum hjá SVF, backup og support av brúkarum. Umframt tað eru eisini ymiskar aðrar ad-hoc uppgávur, sum javnan stinga seg upp í einum livandi umhvørvi.

**Førleikakrøv:**
Viðkomandi útbúgving ella arbeiðsroynd-ir. Ynskiligt er, at umsøkjarin hevur arbeitt við netloysnum, og at umsøkjarin hevur hegni til skjótt at seta seg inn í nýggj forrit og nýggjar skipanir. Neyðugt er, at umsøkjarin er fyrikomandi og hevur lætt við at starvast saman við nógvum ymiskum fólkum.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sjónvarp Føroya, telefon 340400 og spyrja eftir Jónheðin Tróndheim.

Løn sambært sáttmála millum Starvs-mannafelagið og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknir við CV, prógvum og viðmælum verða at senda til Sjónvarp Føroya, postboks 21, 110 Tórshavn, og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 25. januar, 2002.

svf
Sjónvarp Føroya

*Sjónvarp Føroya er sjálvstøðugur stovnur undir landinum, sum mótvegis borgarunum hevur skyldu til at útvarpa sjónvarpssendingar, ið fevna um tíðindi, upplýsing, mentan og undirhald. SvF fíggjar sjálvt rakstur sín. Inntøkurnar stava frá hyggjaragjaldi, umframt handilsligum virksemi.*



# Hvítur posi frá IRF

Í komandi vikum fáa øll húski í limakommunum 12 hvítar posar.

| | | |
|---|---|---|
| Vika 3 | Øki III | Norðoyggjarnar |
| Vika 4 | Øki IV | Vágar, Sandoy, Nólsoy og Skúgvoy |
| Vika 5 | Øki V | Suðuroy |
| Vika 6 | Øki I | Runavíkar-, Nes-, Oyndarfjarðar-, Skála-, Gøtu- og Fuglafjarðar kommuna |
| Vika 7 | Øki II | Sunda-, Eiðis-, Gjáar-, Funning-, Elduvíkar-, Sjóar- og Leirvíkar kommuna og Norðurstreymoy |

Hvítu posarnir eru til reint og turt pappír.

Ein hvítur posi verður heintaður frá hvørjum húski fimtu hvørja vika.

Víst verður annars til kunningarsíðurnar fyri februar og mai í IRF-kalendaranum 2002.

IRF



# Bókhaldstrupulleikar?

Vit átaka okkum bókhaldarbeiði fyri fyritøkur og stovnar

Hetta umfatar m.a. hesar uppgávur:

- Fíggjarbókhald
- MVG uppgerð
- Fakturering
- Debitorrøkt
- Kreditorrøkt

Áhugað kunnu venda sær til:
Knút P. Jacobsen á tel 350 300 ella tel 228 486

KERVI
teld & tøkni
Heykavegur 2, P.O. Boks 3202, FO-110 Tórshavn
tel 350300, fax 350301, e-mail:info@kervi.com, www.kervi.com



# Eysturoyar Røktar- og ellisheim
**620 Runavík**

**Søkir:**

**ERGOTERAPEUT** – 0,7 tíð – at byrja skjótast gjørligt ella eftir nærri avtalu.

Talan er um avloysarastarv fram til 01.04.03.

Løn- og setunartreytir: sambært galdandi sáttmála.

Nærri starvinum viðvíkjandi fæst at vita frá Mariann Poulsen, ergoterapeuti, á tlf. 448201.

Umsókn, saman við avriti av prógvi v.m., skal sendast heiminum innan 28.01.02.



# Gráur posi frá IRF

Frá mánadegnum 14. til leygardagin 19. januar 2002 fær hvørt húski í limakommununum eina rullu við 26 gráum posum frá IRF.

Gráu posarnir eru ætlaðir til dagliga ruskið, sum skal brennast.

Ein gráur posi verður heintaður frá hvørjum vanligum húski um vikuna.

Víst verður annars til kunningarsíðurnar fyri mars og apríl í IRF-kalendaranum 2002.

IRF



# Leygardag
**kl 14.00 - 17.00**

kaffi ella the

&

súreplaterta ella kirsjuberjaterta

&

rómi ella súrrómi

**KR. 30,-**

livandi tónleikur

CAFÉ NATÚR
Tlf. 31 26 25



# Snikkara- og timburarbeiði

verður gjørt – umvælingar sum nýgerð.

**Tlf. 221350**



# Forskallarar

Søkt verður eftir undirarbeiðstakarum til forskallingsarbeiði í Føroyum í styttri og longri tíðarskeið.

Brúk er fyri trimum holdum á ávikavist 6, 3 og 2 monnum.

J&K

**P/f J. & K. Petersen**
Tlf. 215005 & 315060
e-mail: jkp@jkp.fo



# Hús ynskjast

til keyps ella leigu í Skopun.

Skriva til:
**Sosialurin,**
Box 76, 110 Tórshavn
Bill. mrk. 615



# Vikuskifti

Nr. 8 • leygardagur • 12. januar 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo


Oddfríður Marni Rasmussen ummælir ykringasavnið eftir Tórodd Poulsen, Húðsemi

Lesið á síðu 6




# Skerdur stuðul hóttir bókaforløg




Týðandi og virkin bókaforløg í Føroyum eru nú mest sum givin at geva bøkur út. Stuðulin til bókaútgávu er minkaður so nógv, at hvørja ferð ein bók kemur út, legst afturat skuldini hjá forløgunum. Í fjør minkaði talið á føroyskum útgávum við næstan einum triðingi, og útlitini eru vánalig

Lesið grein síðu 4 og 5



## Millum eld og øsku í Sydney

Nakrar fáar kilometrar burturfrá tí herviliga skógareldinum í Sydney í Avstraliu, hava Irdi Hansen og Ken Nónklett úr Føroyum sína dagligu gongd. Tey hava verið í Sydney síðani hálvan november, har tey nú uppliva ein eld av tí allar ringasta

Lesið á síðu 3



## Við eiðismonnum eftir harum

Tveir mánaðar av árinum herjar harufepurin, og hann rakar hundraðtalsmenn, sum seta alt annað til viks fyri at fara at skjóta haru

Lesið á síðu 7